# Varðin við Gljúfrasteinn



## Hugleiðingar frá vitjan í húsi Laxness. Túsundtals vitja árliga Gljúfrasteinn. Kanska bíða mong eftir at vitja Williamshús Undir Varða

### Hugleiðingar



Johan Mortensen

Fjallið Esja hevði klætt seg í vetrarbúna um náttina og oman í hálvu líðina lá kavin henda klára heystarmorgunin. Kalda útnyrðingslotið lá inn yvir víkina, men nógvir reykingar hövdu kortini hættað sær í sundlaugina - svimjihylin.

Frískligt var at koma úr skiftingarrúminum yvir í heita pottin. Samstundis sum heita jarðarvatnið hitaði limirnar, beindi tað bítandi kalda fleyrið fyri leivdunum frá leygarkvöldinum - lunda í laka, stoktari lundabringu í brennivínssós saman við kraftmiklum reyðvíni, sum matstovan í Lækjarbrekkuni 2 hevði á matarskránni.

Komin úr Laugardali og út um Reykjavík seta vit kós ímóti Mosfellsbær. Ætlanin er at vitja "Gljúfrasteinn - hús skáldsins". Heimið hjá kenda skaldi Íslands, Halldóri Laxness, er í dag skipað sum savn. Opið alt árið - eisini ein sunnumorgun á gáttini inn í veturin.

»Ja, veturin verður bæði langur og strangur«, segði ein lögreglumaður, vit móttu. Sipandi til fíggjarliga jarðskjálvtan um veturnætur.

Íslendingar eru náttúrufólk - útivistarfólk - og á götum, sum snúgva seg í lendinum, síggjast fólk. Summi renna, onnur ganga og onkur sæst á hestbaki.

### Halldór - William

Uppi undir Varða stendur eitt lítið hús við einum spískum taki.

Einaferð í vár greiddi Zacharias Heinesen hugtakandi frá skrivismáttuni hjá pápanum, Williami, í Bylgjuni. Ein sending, sum Útvarpið hevði á skránni seinrapartar. Bagge, sum annars ikki er maður við mongum orðum, tók henda dagin lurtaran við sær á eina áhugaverda ferð frá sethúsunum niðan til smáttuna á heygnum.

Vit, sum henda dagin lurtaðu eftir táttinum, Ástaðið, hjá Suna Merkisstein, sóu fyri okkum, hvussu William sleipaði kol niðan í smáttuna, kikaði upp í ovninum og setti seg at skriva í sínum egna heimi. Kanska skrivaði hann á gomlu maskinuni upp á skaldsöguna Den Sorte Gryde, stuttsöguna Grylen ella skrivaði hann um teir glataðu spælimenninnar….

William er nógv lisin í Evropa og nógv ferðafólk hava hug at síggja húsið hjá honum, greiddi Bagge frá. Tað skiltist, at alt er framvegis í húsinum. Tað er, sum tað var, tá William og Lisa livdu. Heimið er varðveitt. Eisini stovan, har hann klipti tær hugtakandi klippmyndirnar seinastu árini. Ein dýrgripur hjá Havnini, sum tilnevndi hann til heiðursborgara.

### Við Köldukvísl

Vit eru komin á Þingvallarvegin og koyra inn í breiða Mosfellsdalin. Rættiliga oyði. Gullittu heystarlitirnir eru um at taka yvir í líðunum. Til vinstru handar síggja vit Laxness-garðin, sum er kendur fyri sína góðu hestaleigu. Tað hevði verið hugaligt at farið "á bak" í hesum góðveðrinum, men í dag er ein onnur mentan á dagsskrá.

Stutt frá Þingvallarvegnum liggur eyðkenda hvíta húsið. Halldór og konan, Auður, lótu byggja Gljúfrasteinn í fjörutiárunum. Nærhendis skálanum, har Halldór vaks upp. Og skamt frá ánni við tí kaldliga navninum, Kaldakvísl.

»Eru tit feyringar. Hér koma ekki margir feyringar«, flennur fryntligi bókmentafröðingurin í móttökuni og er skjót at peika á skaldsöguna Undir egið borð. Tað er föroyska heitið á kendu skaldsöguna, Sjálvstætt Fólk, sum Tóra Tóroddsdottir og Martin Næs, hava föroyskað. Hon liggur millum mongu skaldsögurnar hjá Laxness, sum eru týddar til meiri enn fjöruti tungumál.

Í móttökuni niðanvert sethúsini síggja vit eisini eina krýniku um skaldið og samtíð hansara á einum skýggja. Og samtíð Laxness er öll 20. öld. Föddur í ´02 og deyður í ´98. Brot er úr samröðum við Halldór og frásagnir eru eisini um eitt nú bókútgávur.

Sjálvstætt Fólk telist millum 100 tær bestu skaldsögurnar í

Sosialurin